Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	16/02/2021
Mál nr.:	20/00494
Málsviðgjørt:	MM
Eftirkannað:	21. januar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Talgildu Føroyar
(Heimild at hækka útreiðslur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 77 frá 29. mai 2017 um Talgildu Føroyar verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, stk. 2 verður "145 mió. kr." broytt til: "153 mió. kr.".

2. Í § 1, stk. 3 verður "85 mió. kr." broytt til: "93 mió. kr.".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar
Talgildu Føroyar er ein verkætlan, sum varð skipað undir Gjaldstovuni í 2016, og skuldi eftir ætlan koyra fram til árslok 2020. Arbeiðið í Talgildu Føroyum er grundað á tilmæli úr heildarætlan um Talgildu Føroyar frá 1. oktober 2015.

Fýra høvuðstættir eru í verkætlanini Talgildu Føroyar:

- Samleikin: Ein trygg elektronisk innritan og undirskrift.
- Vangin: Ein felags tænastuportalur, ið gevur borgaranum skjóta og einfalda atgongd til almennar tænastur og dátur.
- Grundardátur: Grundardáturnar eru upplýsingar um persónar, virki, fasta ogn, adressur, og talgild kort.
- Heldin: Pallur til trygt og standardiserað dátusamskifti.

Nærum allir tættir í verkætlanini eru framdir, undantikið tveir tættir undir "Grundardátur". Tað eru verkætlanirnar virkisskrá og tinglýsingarskipan, sum eru talgildar. Hesar verkætlanir eru framvegis ikki framdar vegna vantandi fígging frá kommununum. Tórshavnar Kommuna hevur tó verið partur av verkætlanini síðan 2018, og fleiri kommunur eru blivnar partur av verkætlanini í seinnu hálvu av 2020.

Upprunaliga varð mett, at samlaða Talgildu Føroyar verkætlanin kostaði 150 mió. kr. í tíðarskeiðinum 2016-2020. Verklagslóg, sum var grundarlagið fyri samlaðu verkætlanini, varð samtykt av Løgtinginum í 2017. Arbeitt hevur verið við einum fíggingarmyndli, har landið rindaði 90 mió. kr., meðan kommunur og týðandi áhugapartar rindaðu tær írestandi 60 mió. kr. Avtalur vóru í fyrsta umfari fingnar við nevndu partar um 37 mió. kr. Sostatt vantaðu 23 mió. kr. í ætlaðu fíggingini á 150 mió. kr., harav 15 mió. kr. frá kommunum (fyriuttan Tórshavnar Kommunu, sum avtala varð gjørd við). Arbeitt varð sostatt eftir einari samlaðari fígging á 127 mió. kr. Á sumri 2020 høvdu fleiri kommunur rindað sín part. Samanlagt er talan um eina upphædd svarandi til 6 mió. kr., harav 1 mió. kr. vórðu brúktar í 2020, meðan hinar 5 mió. kr. vórðu settar á játtanina fyri 2021. Av tí at peningurin frá kommununum er komin so seint, verður verkætlanin longd við umleið 1,5 ári. Hetta merkir at verkætlanin dýrkar, og tí fæst ikki tað sama fyri peningin hjá kommunum, sum upprunaliga roknað við.

Hóast allar kommunur í Føroyum gerast partur av verkætlanini, røkkur henda fígging í dag hvørki til at menna eina virkisskrá ella tinglýsingarskipan. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst seinkanin av hesum verkætlanum, soleiðis at neyðugt er at leingja Talgildu Føroyar verkætlanina og hava fólk í starvi longur. Harafturat er kostnaðarstøðið fyri verkætlanina hækkað í mun til kostnaðarmetingarnar, sum vórðu gjørdar í 2015.

Ætlanin er tískil at menna nýggja talgilda virkisskrá í 2021/2022. Umframt eina virkisskrá er ætlanin at gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar (2. útgáva) og menna fleiri tænastur á Vanganum. Talgilda tinglýsingarskipanin verður tikin úr verkætlanini, og verður í staðin partur av nýggju heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar (2. útgáva). Í hesum sambandi verður nýggj verklagslóg væntandi løgd fyri Løgtingið í 2021.

Ein virkisskrá er ein almenn skrá við grundardátum um løgfrøðiligar eindir, framleiðslueindir og undirframleiðslueindir í Føroyum, sbrt. løgtingslóg nr. 70 frá 9. mai 2019 um Virkisskrá. Tílíkar eindir fevna millum annað um virki, stovnar, felagsskapir og aðrar fyrisitingarligar eindir.

Grundardátur eru grundleggjandi upplýsingar um nevndu eindir, ið verða nýttar av flest øllum almennum myndugleikum, borgarum og virkjum. Grundardátur eru m.a. upplýsingar um V-tal, navn, virkishátt, adressu, nevnd, starvsfólkatal v.m. Virkisskráin verður undirstøði undir hesum dátum og tryggjar eina álítandi, munadygga og skynsama útvegan og nýtslu av grundardátum.

Í Føroyum finst eingin almenn skrá við grundardátum um eindir, sum eintýdd eyðmerkir føroyskar eindir. Fleiri stovnar og virki viðlíkahalda tískil sína egnu skrá yvir eindir í Føroyum, og summi styðja seg í ávísan mun til skránna hjá TAKS. Eingin ella lítil samskipan er av hesi innsavnan, og trupult er at samskifta og endurnýta somu grundardátur millum almennar stovnar og privatar eindir. Eisini hevur hetta við sær, at neyðugt er við handligum viðlíkahaldi á hvørjum stovni/virki, tá ið ein eind t.d. skal broyta navn, bústað og telefonnummar v.m.. Við einari almennari virkisskrá verður lættari at finna, útvega og viðlíkahalda hesar grundardátur.

Føroyar eru limur í altjóða skattasamstarvinum Global Forum, sum snýr seg um gjøgnumskygni og umbýting av skattaupplýsingum millum limalond. TAKS útflýggjar og umbýtir í dag grundardátur og skattaupplýsingar við limalond, har føroyskar fyritøkur hava virksemi. Í hesum sambandi fær TAKS m.a. upplýsingar frá Skráseting Føroya, Hagstovuni og peningastovnum.

Global Forum krevur m.a., at limalondini menna eina virkisskrá, sum skal lúka serligar treytir. TAKS og Skráseting Føroya eru við til at menna virkisskránna í mun til tær treytir, sum Global Forum setir. TAKS fær við virkisskránni lættari atgongd til grundardátur í mun til tað framhaldandi arbeiði við at útflýggja og umbýta upplýsingar við limalond.

Umframt eina virkisskrá skulu limalondini menna eina eigaraskrá, sum er eitt yvirlit yvir, hvørjir reellu eigararnir í einari ávísari fyritøku eru. Slíkt yvirlit finst ikki í Føroyum í dag, men verður ein partur av nýggju virkisskránni.

Við jøvnum millumbilum verður føroyska lóggávuverkið og umsitingin skoðað av umsjónarfólki frá Global Forum. Er lóggávuverkið og umsitingin ikki í samsvari við krøvini frá Global Forum, kann hetta hava negativa ávirkan á føroyskar fyritøkur, við tað at kreditvirðið og møguleikin fyri at taka lán á altjóða marknaðinum versnar.

Í § 1, stk. 3 í galdandi løgtingslóg nr. 77 frá 29. mai 2017 um Talgildu Føroyar er ásett, at útreiðslurnar hjá landsstýrismanninum í mesta lagi kunnu verða 85 mió. kr. Hetta hámark er nátt við árslok 2020 og neyðugt er tí at hækka ásettu upphæddina við 8 mió. kr., frá 85 mió. kr. til 93 mió. kr., til at menna nýggja virkisskrá, gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar og menna fleiri tænastur á Vanganum, sbrt. § 1, nr. 2 í hesum uppskoti.

Mett verður, at við fígging frá øllum kommununum í Føroyum, umframt einari játtan á 8 mió. kr., sum ásett í hesum uppskoti, er møguligt at menna nýggja virkisskrá, gera nýggja heildarætlan og menna fleiri tænastur á Vanganum.

1.1. Orsakir til uppskotið

Orsøkin til, at lógaruppskotið verður gjørt, er at fáa til vegar heimild til at hækka útreiðslurnar hjá landinum til verkætlanina Talgildu Føroyar við 8 mió. kr., til at menna nýggja virkisskrá, gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar og menna fleiri tænastur á Vanganum, sbrt. § 1, nr. 2 í hesum uppskoti.

1.2. Galdandi lóggáva
Løgtingslóg nr. 77 frá 29. mai 2017 um Talgildu Føroyar.

Løgtingslóg nr. 70 frá 9. mai 2019 um Virkisskrá.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja neyðuga lógarheimild til at hækka útreiðslurnar hjá landinum til at menna eina nýggja almenna virkisskrá, har grundardáturnar altíð eru dagførdar, álítandi og ókeypis. Harumframt er ætlanin at gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar og menna fleiri tænastur á Vanganum, sbrt. § 1, nr. 2 í hesum uppskoti.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Í § 1, stk. 3 í galdandi løgtingslóg nr. 77 frá 29. mai 2017 um Talgildu Føroyar er ásett, at útreiðslurnar hjá landsstýrismanninum í mesta lagi kunnu verða 85 mió. kr. Hetta hámark er nátt við árslok 2020 og neyðugt er tí at hækka ásettu upphæddina við 8 mió. kr., frá 85 mió. kr. til 93 mió.kr., til at menna nýggja virkisskrá, gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar og menna fleiri tænastur á Vanganum, sbrt. § 1, nr. 2 í hesum uppskoti.

Við einari almennari virkisskrá fær føroyska samfelagið:
- Eina fullfíggjaða og álítandi virkisskrá, sum kann gagnnýtast av øllum.
- Dagførda, álítandi og ókeypis atgongd til grundardátur um løgfrøðiligar eindir, framleiðslueindir og undirframleiðslueindir.
- Økt gjøgnumskygni og betri hagtalsgrundarlag.
- Dupultskráseting fellur burtur.
- Útflýggjan og móttøka av grundardátum millum ymiskar partar verður lættari.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Fíggjarmálaráðið metir ikki, at neyðugt er at senda uppskotið í hoyring, grundað á at broytingin einans skal tryggja neyðuga lógarheimild til at hækka útreiðslurnar hjá landinum til verkætlanina Talgildu Føroyar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur við sær, at útreiðslurnar hjá landinum til verkætlanina Talgildu Føroyar hækka við 8 mió. kr., frá 85 mió. kr. til 93 mió.kr., til at menna nýggja virkisskrá, gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar og menna fleiri tænastur á Vanganum, sbrt. § 1, nr. 2 í hesum uppskoti.

Mett verður, at tá ið virkisskráin er liðug, skulu 0,2 ársverk afturat á Gjaldstovuni til at umsita og viðlíkahalda KT-skipanina til virkisskránna. Harafturat skal 1 ársverk afturat á Hagstovuni til at viðlíkahalda grundardátur um almennar stovnar og framleiðslueindir.

TAKS og Skráseting Føroya skulu viðlíkahalda grundardátur um eindir, ið hesir stovnar viðlíkahalda frammanundan. Mett verður tí, at nýggja virkisskráin ikki hevur fíggjarligar avleiðingar fyri hesar stovnar.

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Talgildu Føroyar skulu menna nýggju virkisskránna, meðan Gjaldstovan skal umsita og viðlíkahalda KT-skipanina til virkisskránna, tá ið hon er liðug. Hagstovan skal viðlíkahalda grundardátur í virkisskránni um almennar stovnar og framleiðslueindir.

TAKS og Skráseting Føroya skulu viðlíkahalda grundardátur um eindir, ið hesir stovnar viðlíkahalda frammanundan. Mett verður tí, at nýggja virkisskráin ikki hevur umsitingarligar avleiðingar fyri hesar stovnar.

Við virkisskránni verður møguligt hjá borgarum og fyritøkum at heinta grundardátur um eindir í Føroyum á alnótini. Hetta fer at leysgeva orku í umsitingini hjá bæði almennum stovnum og privatum fyritøkum. Harafturat verður møguligt at dagføra skráir hjá almennum stovnum og privatum fyritøkum sjálvvirkandi, sum eisini leysgevur orku í umsitingini.

Broytingin hevur ikki aðrar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Broytingin hevur jaliga ávirkan á umstøðurnar hjá vinnuni at virka í, við tað at nýggja talgilda virkisskráin ger tað møguligt hjá borgarum og fyritøkum at heinta grundardátur um eindir í Føroyum á alnótini. Hetta leysgevur orku í umsitingini hjá bæði almennum stovnum og privatum fyritøkum. Harafturat verður møguligt at dagføra skráir hjá almennum stovnum og privatum fyritøkum sjálvvirkandi, sum eisini leysgevur orku í umsitingini.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Ein talgild virkisskrá letur upp fyri, at minni pappír verður brúkt í almennari- og privatari umsiting.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Talgildingin hevur jaligar sosialar avleiðingar fyri borgarar í síni heild.

Talgildingin skal gera tað lættari hjá teimum við skerdum førleikum og teimum, sum eru stødd á útoyggj, til skips ella uttanlands at brúka talgildar tænastur.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Føroyar eru limur í altjóða skattasamstarvinum Global Forum, sum snýr seg um gjøgnumskygni og umbýting av skattaupplýsingum millum limalond. TAKS útflýggjar og umbýtir í dag grundardátur og skattaupplýsingar við limalond, har føroyskar fyritøkur hava virksemi. Í hesum sambandi fær TAKS m.a. upplýsingar frá Skráseting Føroya, Hagstovuni og peningastovnum.

Global Forum krevur m.a., at limalondini menna eina virkisskrá, sum skal lúka serligar treytir. TAKS og Skráseting Føroya eru við til at menna virkisskránna í mun til tær treytir, sum Global Forum setir. TAKS fær við virkisskránni lættari atgongd til grundardátur í mun til tað framhaldandi arbeiðið við at útflýggja og umbýta upplýsingar við limalond.

Umframt eina virkisskrá skulu limalondini menna eina eigaraskrá, sum er eitt yvirlit yvir, hvørjir reellu eigararnir í einari ávísari fyritøku eru. Slíkt yvirlit finst ikki í Føroyum í dag, men verður ein partur av nýggju virkisskránni.

Við jøvnum millumbilum verður føroyska lóggávuverkið og umsitingin skoðað av umsjónarfólki frá Global Forum. Er lóggávuverkið og umsitingin ikki í samsvari við krøvini frá Global Forum, kann hetta hava negativa ávirkan á føroyskar fyritøkur, við tað at kreditvirðið og møguleikin fyri at taka lán á altjóða marknaðinum versnar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki týdning fyri tvørgangandi millumtjóða sáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar. Ein talgild virkisskrá hevur jaligar avleiðingar fyri almennar myndugleikar, borgarar og virki í síni heild, við tað at tað verður lættari at finna, útvega og viðlíkahalda grundardátur um eindir í Føroyum. Eisini fær TAKS lættari atgongd til grundardátur í mun til tað framhaldandi arbeiðið við at útflýggja og umbýta upplýsingar við limalond.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið elvir ikki til revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at hækka útreiðslurnar hjá landinum til verkætlanina Talgildu Føroyar við 8 mió. kr., frá 85 mió. kr. til 93 mió.kr.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í § 1, stk. 3 verður "85 mió. kr." broytt til "93 mió. kr.". Broytingin í § 1, nr. 2 gevur landsstýrismanninum heimild at hækka útreiðslurnar hjá landinum til verkætlanina Talgildu Føroyar við 8 mió. kr., frá 85 mió. kr. til 93 mió. kr., til at menna nýggja virkisskrá, gera nýggja heildarætlan fyri Talgildu Føroyar og menna fleiri tænastur á Vanganum, sbrt. § 1, nr. 2 í hesum uppskoti.

Í § 1, stk. 2 verður "145 mió. kr." broytt til "153 mió. kr.". Við broytingini í § 1, nr. 1 verður tann samlaða upphæddin til verkætlanina Talgildu Føroyar hækkað við 8 mió. kr., frá 145 mió. kr. til 153 mió. kr. Tann samlaða upphæddin fevnir um fígging frá landinum, kommunum og samstarvsfeløgum (privatum og almennum partafeløgum o.l.).

Til § 2
§ 2 ásetir gildiskomu fyri hesa løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Talgildu Føroyar.

Fíggjarmálaráðið, 16. februar 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1. Javntekstur